## Lærarar søkjast

Søkt verður eftir 4 lærarum til Miðvágs-Sandavágs skúla skúlaárið 2000/2001.

Størvini umfata allar vanligar lærugreinar í 1.-10. flokk og tvey av størvunum hava niðursett tímatal.

Størvini eru tíðaravmarkað og lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu verða skúlanevndini í hendi í seinasta lagi **mikudagin 14. juni** og sendast til:

**Miðvágs-Sandavágs skúlanevnd**
v/Kristionnu Larsen á Lofti
360 Sandavágur



## Føroya Tele - Søldarfjørður

**Montørur**

Søkt verður eftir einum montøri til Føroya Tele – Søldarfjørð. Arbeiðið er í stóran mun nýgerð og viðlíkahald av telefon-instalatiónum.

Tað krevst at tú dugir at arbeiða sjálvstøðgut, ert opin og at tú dugir at veita kundunum eina fyrsta floks tænastu.

Vit kunnu bjóða eitt áhugavert arbeiði við serligum atliti til
- nýgerð og viðlíkahald av instalatiónum
- vanligari telefonútgerð
- vekslarar
- innanhýsis kaðalskipanir
- uttanhýsis kaðalskipanum
- teleterminalar av ymiskum slag
- internet og ISDN
- rágeva kundum um felagaútgerð og tænastur.

**Útbúgving:** Elektrikari, líknandi útbúgving ella hollar arbeiðsroyndir.

**Starvsstaður:**
Øki-4 Eysturoy

**Uppmøtingarstað:**
Føroya Tele í Søldarfirði

**Byrjunnardato:**
Skjótast til ber

Starvið er lønt sambart sáttmála millum Føroya Tele og Starvsmanna-felagið.

Áhugaði kunnu venda sær til starvsfólkadeildina á tlf.: 303030 ella Sofus Nielsen á tlf. 243740.

Umsóknirnar skulu verða starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 16. juni 2000 og skulu sendast til

Føroya Tele
Att.: Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo
Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá P/F Telefonverkið · Reg. no. 2697

SANSIR · TEL 355 355



## Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16



**Trukkar, stáblarar og BT lyftivognar til tygara tørv!**



Sosialurin - 311820

Vit útvega EXIDE battaríir, løðitól til **øll merkir** av trukkum og stáblarum

Tosið við okkum!

**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008



**DANNY TRANSPORT**

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

**Tlf. 319192**



*Lýsið í* **sosialinum**


[redacted]



# Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:
www.sosialurin.fo

## Hálsaðu um

*Nevndin í dómarafelagnum skifti støðu fríggjadagin, og leygardagin varð so kunngjørt, at allir dystirnir í 1. deild kortini vórðu leiktir*



*Eftir rokið hóskvøldið var lagið á dómarunum koritni batnað somikið,at dystirnir kundu avgreiðast sum ætlað*
***Tilvildarliga vald mynd***

Jákup Mørk

Einki er at siga til, at fótbóltsáhugað tóktust rættuliga ørkymlað undan dystunum hetta vikuskiftið.

Hóskvøldið frættist, at fótbóltsdómarafelagið hevði gjørt av, ikki at døma nakran dyst í bestu deildini hetta vikuskiftið, orsakað av ónøgd um dómin, sum KÍ fekk eftir tilburðin í Klaksvík, har linjuverji varð sligin í búkin.

Leiðslan í FSF harmaðist sjálvandi um hetta stigið, og teir bjóðaðu eisini dómarunum at koma á fund í hesi vikuni, men støðan hjá dómarunum tóktist greið.

- Vit døma ikki, segði formaður felagsins í leygardagsSosialinum, og sambært honum var talan als ikki um nakað útspæl móti FSF, men heldur eini greið boð.

Út á fríggjakvøldið var tó líkt til, at dómararnir vóru um at hoykna í kongunum, og á viðmerkingunum, sum hoyrdust í loftbornu fjølmiðlunum, skiltist, at støðan als ikki var so greið kortini.

### Frægast fyri fótbóltin

- Orsøkin til, at vit brádliga skiftu hugsan í málinum er, at nevndin í dómarafelagnum og FSF komu ásamt um, at fundur skuldi haldast mánadagin, og tí sendu vit eina áheitan til dómararnar um at døma dystirnar. Orðini eigur Hans Falkvard Hansen, sum er formaður í dómarafelagnum. Víðari sigur hann, at nevndin ikki á nakran hátt hevur roynt at lagt trýst á dómararnar, fyri at fáa teir at døma.

- Fleiri dómarar ringdu til mín leygardagin, og boðini eg gav teimum, vóru í øllum førunum tey somu: Geri tað, sum tit halda tykkum kunna standa inni fyri, og ikki hugsa um støðuna hjá nevndini.

Spurdur, hvørt nevndin ikki góðtók avgerðina hjá dómarunum, sigur Hans, at nevndin ongantíð tók undir við uppskotinum frá dómarunum. Fudnurin var tó viðtøkuførur, leggur formaðurin dent á, men hann sigur samstundis, at hann heldur at nevndin hevði fullan rætt til at handla sum hon gjørdi.

- FSF setti seg í samband við okkum, og beyð okkum á fund, har umrøddu viðurskiftini kundu fáast upp á pláss, og hetta hildu vit vera ein loysn, sum vit kundu liva við. Eisini fyri at faa dystirnar avgreiddar, tí hetta var eftir okkara tykki frægasta loysnin fyri fótbóltin sum heild.

### FSF raknað við

Hóskvøldið segði formaðurin annars, at talan ikki var um nakað forhandlingsútspæl, men sunnukvøldið vóru boðini øðrvísi. Til hetta segði formaðurin, at tað er ikki alt, man fær sagt beinanvegin, og hann legði enn einaferð dent á, at nevndin metti seg hava funnið eina loysn, nú FSF hevur boðið teimum til fundar.

Men hvørji mál verða so tey, sum verða viðgjørd á fundinum, sum varð hildin eftir evstamark í gjár?

- Talan verður um allar teir lutir, sum vit eru ónøgdir við í samstarvinum við FSF. Dómurin í konkreta málinum í Klaksvík verður tó ikki kærdur. Hetta hava vit onga heimild til.

Vit hava tó fingið Fótbóltssambandið at rakna við, og so mugu vit vóna, at vit fáa so nógv sum gjørligt á skaftið.

### Dómarin gevst

Leygardagin frættist, at dómarabólkurin, sum dømdi dystin í Klaksvík, gevst at døma, tí teir kenna seg stungnar í ryggin, nú dystirnir í bestu deildini kortini vórðu avgreiddir. Hevur formaðurin í dómarafelagnum forstáilsi fyri hesum?

- Bæði og. Tað skal eingin ivi vera um, at vit bakka dómaran 100% upp í málinum í Klaksvík, men hinvegin kunnu vit ikki taka undir við teirra hátti at handfara málið upp á. Vit kunnu sjálvandi ikki á nakran hátt góðtaka, at dómari ella linjuverji verða slignir i búkin, men harífrá og so til at blokera dystirnar er eftir mínari fatan eitt dekan ov langt lop.

Tú mást eisini hugsa um, at um felagið hevur uppfylt tær treytir, sum verða settar í málinum, so má eisini verða mark fyri, hvussu hørð revsingin kann verða.

Eg eri tó sjálvandi sera harmur, um hetta viðførir, at dómarabólkurin gevst, tí talan er uttan iva um ein av bestu dómarabólkunum, sum vit eiga í Føroyum.

### Eingin ivi um frágreiðingina

Frá FSF formanninum skiltist friggjadagin, at hann var í iva um, hvørt hendingin í Klaksvík yvirhøvur fór fram. Hevur hetta eisini havt ávirkan á tykkara støðutakan í málinum?

- Nei, avgjørt ikki. Tað má ongantíð sáast ivi um, hvørt dómarin sigur satt í frágreiðing sínari, tí verður tað gjørt, so er jú alt álit millum dómarar burtur.

Orsøkin til broyttu støðutakanina er snøgt sagt tann, at vit nú kunnu koma upp á tal við FSF. Dómarin er jú ikki settur at meta um, hvørjar revsingar ávís mál at eigga at viðføra. Dómarin er settur til at leiða dystin, og hetta haldi eg eisini at vit eiga at halda okkum til. Restina mugu aðrar kreftir taka sær av. Blanda vit hesi mál saman, fáa vit beinanvegin habilitetstrupulleikar, og tað kunnu vit ikki hava.

### Tættari samstarv

Hvørji mál fer dómarafelagið so at leggja serliga dent á mánakvøldið?

- Vit skulu skap álit millum partarnar, soleiðis at avgerðir í framtíðini ikki vera tiknar at kalla yvir høvdið á dómarunum. Talan skal snøgt sagt verða um eitt tættari samstarv millum dómararnar og FSF.

Um trygdin hjá dómarunum skal betrast, er eisini eitt mál, sum støða skal takast til. Skulu gyrðingar gerast, har dómararnir ganga út, ella skal verjan av hesum skipast øðrvísi enn hon er í løtuni. Hetta eru alt spurningar, sum eru relevantir at taka upp, og tað fara vit helst eisini.

Eisini eiga vit at finna eina greiðu linju um, hvørji mál skulu fráboðast fótbóltssambandinum. Sum er, senda onkrir dómarar fráboðan inn um okkurt, sum aðrir dómarar ikki leggja so nógv í, og hetta ber jú heldur ikki til. Altjóðagerðingin av fótbóltin setur jú eisini krøv um, at vit sum dómarar skulu fylgja altjóða reglum, so eisini her er nakað at tosa um hjá okkum.

Eitt nú hava vit nú fingið sonevndu dómaratestina at rigga, soleiðis at vit kunnu tryggja, at dómararnir eru nóg væl fyri kropsliga, og hetta er so í øllum førum eitt stig á leiðini.

At enda sigur formaðurin í dómarafelagnum, at tað nú ræður um hjá teimum at koma víðari, soleiðis at fótbólturin verur tæntur sum best.

- Høvdu vit hildið fast um, dystirnir ikki skuldi spælast, hevði hetta fyrst og fremst rakt feløgini og ikki FSF, og tað var jú ongantíð ætlanin við tiltakinum, sigur formaður felagsins at enda.

## Talan varð um prinsippmál

*Tí gjørdi Lassin Isaksen at taka ein aktivan leiklut í dómarastríðnum*



*Eg gjørdi av at taka ein aktivan leiklut, tá málið vísti seg at vera eitt prinsippmál, sigur Lassin Isaksen*

Jákup Mørk

Eftir at upprunaliga avgerðin hjá dómarafelagnum meira ella minni varð broytt, soleiðis at nevndin heitti á dómararnar um kortini at døma dystirnar, vóru mong, sum, undraðust.

### Skifti støðu

Ein av orsøkunum til hetta var, at Lassin Isaksen, sum er í nevndini í dómarafelagnum, brádliga var vorðin ein aktivur partur í málinum. Upprunaliga vildi hann annars ikki vera við á fundinum hóskvøldið, tí málið snúi seg um KÍ, sum er felagið, sum Lassin dømir fyri.

Lassin greiðir frá, at orsøkin til, at hann ikki var á upprunaliga fundinum var, at hann helt at fundurin bert snúi seg um hendingina í Klaksvík. – Eg vildi tí ikki fara á fundin, tí tað kundi lættliga hent, at onkur viðmerking frá mær varð tikin illa upp, um hon ikki samsvaraði við aðrar hugsanir, soleiðis at onkur skilti tað soleiðis, at eg royndi at hjálpa KÍ. Tað hevði eg nevnliga als ongar ætlanir um, tí eg kann sjálvsagt ikki á nakran hátt taka undir við tí, sum fór fram í Klaksvík, sigur Lassin.

- Tá eg so seinni fann út av, at málið var blivið til eitt prinsippmál, var støðan jú ein heilt onnur, og tá helt eg tað vera rætt av mær at traðka til.

Sjálvur eri eg annars samdur í tí, sum er ført fram í skrivinum frá dómarafelagnum, men eg meti tó ikki, at tað er rætt at fara í verkfall av teirri ávum. Verkfall ella blokada má metast at vera absolutt síðsta vápn okkara, og eigur bert at vera nýtt, um einki annað riggar. Nú hava vit so fingið ein dialog ígongd, og vónandi kann hetta viðføra, at vit í størri mun vera hoyrdir í FSF, ístaðin fyri sum nú, at allar avgerðir verða tiknir yvir høvdið á okkum, sigur Lassin Isaksen at enda.